

*Janus Kamban og Heðin Mortensen á skrivstovuni hjá borgarstjóranum í gjár, tá ið Janus hevði handað borgarstjóranum ognirnar hjá søguliga felagsskapinum Havnar Hugna.*

*Mynd: Terji Nielsen*

# Hugnaligur felagsskapur í søguna

**Á miðdegi í gjár var Janus Kamban á skrivstovuni hjá borgarstjóranum í Havn, Heðin Mortensen, har hann avhandaði ognirnar hjá gamla felagsskapinum Havnar Hugni. Ein felagsskapur, sum varð settur á stovn í seinnu helvt av fýratiárunum til tess at gera Havnina hugnaligari.**

**SØGULIGUR FELAGSSKAPUR**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Janus Kamban greiðir frá, at tað var Andrias Ziska, sáli, ið tók stig til at stovna felagsskapin einaferð í seinnu helvt av fýratiárunum. Aðrir, sum vóru við til at stovna Havnar Hugni, vóru eitt nú Knút Wang og Sverri Dahl.

### Eitt sjálvásett býráð

– Endamálið við Havnar Hugna var fyrst og fremst at gera Havnina meiri hugnaliga. Undirtøkan var góð, og á fundum í felagnum var dúgliga kjakast um eitt nú leysgangandi høsn og dunnur í havnargøtum, greiðir Janus Kamban frá.

Tá ið felagsskapurin var stovnaður, sat J. P. Hendriksen sum borgarstjóri í Havn, men stutt eftir tók Kjartan Mohr yvir, og Janus Kamban minnist aftur á, at Kjartan Mohr heldur speiskliga helt Havnar Hugna verða eitt slag av einum sjálvásettum býráði.

– Eitt av teimum átakum, sum felagsskapurin tók stig til, var at gera eitt spælipláss aftan fyri fimleikahøll realskúlans. Har lógu barakkgrundir eftir ensku hermenninar, men økið bleiv ruddað, og eitt spælipláss gjørt, minnist Janus Kamban aftur á.

### Virksemi minkaði

So líðandi minkaði virksemið hjá felagsskapinum, tí kommunan átók sær í alsamt størri mun slíkar uppgávur, ið vóru við til at fríðka um býin og gera hann hugnaligari. Hesi seinnu mongu árini hevur einki virksemi verið, men Havnar Hugni hevur framvegis eina konto í Føroya Banka. Á skrivstovuni hjá borgarstjóranum í gjár handaði Janus Kamban so kontoina til Heðin Mortensen. Talan er um slakar 3.000 krónur.

– Eg dugi í løtuni ikki at siga, hvat peningurin verður brúktur til, men tað er einki at ivast í, at býráðið fer at brúka peningin í tráð við andan hjá Havnar Hugna, sigur Heðin Mortensen.

Ársins maður og kvinna 2005:

## Enn møguleiki at koma við uppskotum

**Freistin til at skjóta upp ársins mann og kvinnu í Føroyum í 2005 longd til fríggjadagin**

**HEIÐUR**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Freistin til at skjóta upp ársins mann og kvinnu í Føroyum í 2005 er longd til fríggjadagin komandi. Hon var annars úti í dag. Øll hava møguleika at vera við til at skjóta upp tann persón, mann og kvinnu, sum tey halda hevur uppiborið at fáa heitið: "Ársins maður" og "Ársins kvinna" í Føroyum 2005.

Maður og kvinna, sum hava uppiborið hetta heiti, kunnu hava gjørt nakað GOTT fyri onnur menniskju, síni næstu, tað veri seg familju, vinir, grannar, starvsfelagar og fólk annars. Hesi kunnu eisini hava gjørt nakað GOTT fyri sítt nærumhvørvi, lokalsamfelagið ella samfelagið sum heild, ella fyri eina søk, fyri eitt ávíst felag ella felagsskap, fyri eitt yrki ella eitt arbeiðspláss. Tað ber eisini til at skjóta upp fólk, sum tit halda hava gjørt nakað GOTT við at hava havt serstaka kveikjandi og hitandi ávirkan á onnur.

Veljið tykkara mann og kvinnu og grundgevið, hví hesi eru tykkara val.

Fyllið út lepan aðrastaðni í blaðnum og sendið hann við brævbjálva til okkara: Sosialurin Tórsgøta 1 ella Postsmoga 76, við merkinum: "Ársins maður í 2005" og "Ársins kvinna í 2005". Tit kunnu eisini senda uppskot tykkara sum vanligt bræv. Og eisini ber til at senda hetta sum teldupost til arsins@sosialurin.fo.

Ein dómsnevnd fer at velja ársins mann og kvinnu út millum uppskotini. Tey bæði verða kunngjørd á samkomu í Miðlahúsinum mánadagin 23. januar kl. 16

# KT-stevna í apríl

Í døgunum 20. og 21 apríl verður KT-stevna í Norðurlandahúsinum í Havn. Talan er um triðju KT-stevnuna, sum skipað hevur verið fyri. Tær báðar fyrstu vóru í ávíkavist 2002 og 2004, so tað sær út til, at ein slík stevna verður á skránni annaðhvørt ár.

Á stevnuni, sum KT-felagið skipar fyri, fer føroyska KT-vinnan at sína fram sínar førleikar, og eisini verða fleiri fyrilestrar á skránni við bæði føroyskum og útlendskum røðarum.

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum stendur at lesa, at endamálið við KT-stevnuni er at varpa ljós á føroysku KT-vinnuna og skapa tilvitan um, at vinnan hevur nógv gott at bjóða, og at hon í stóran mun er før fyri at nøkta tann KT-tørv, sum er í Føroyum.

**tn**

# Føroyingar fingu 172 milliónir meira í løn

**Sambært hagtølum hjá Hagstovu Føroya vóru samlaðu lønarútgjaldingarnar í Føroyum í fjør 172 milliónir hægri, enn tær vóru árið fyri.**

**LØNAR-ÚTGJALDINGAR**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í prosentum svara tær 172 milliónirnar til ein vøkstur upp á 2,9 prosent. Í alt vóru samlaðu lønargjaldingarnar í Føroyum í fjør 6,1 mia. krónur.

Verður hugt at hagtølunum sæst, at tað serliga er innan almenna fyrisiting, og vinnuligar tænastur, at lønargjaldingarnar eru nógv vaksandi. Men eisini innan fiskiskap eru gjaldingarnar nógv vaksnar, góðar 57 milliónir, og tað eru umleið 7,4 prosent.

Eisini eru lønargjaldingarnar vaksnar innan flutning og aðrar vinnuligar tænastur.

### Stórst afturgongd

Ikki óvæntað er tað innan ali- og kryvjivirki, at størsta afturgongdin í lønargjaldingum er. Lønargjaldingarnar í hesum bólki vóru í 2005 slakar 60 milliónir krónur í mun til góðar 91 milliónir krónur í 2004.

Um hugt verður at gongdini hesi seinnu árini í lønargjaldingunum, so sæst, at vøksturin hetta seinasta árið er tann størsti síðani 2002.

| | 2004 | 2005 | broyting | |
|---|---|---|---|---|
| | | | kr. | prosent |
| **Vinnugreinir:** | | | | |
| Landbúnaður | 7.317 | 8.041 | 723 | 9,9 |
| Fiskiskapur | 777.097 | 834.301 | 57.203 | 7,4 |
| Ali- og kryvjivirki | 91.615 | 59.959 | -31.657 | -34,6 |
| Ráevnisvinna | 21.331 | 24.456 | 3.125 | 14,7 |
| Fiskavøruídnaður | 396.280 | 380.207 | -16.073 | -4,1 |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 127.681 | 131.335 | 3.654 | 2,9 |
| Ídnaður annars | 217.523 | 223.411 | 5.887 | 2,7 |
| Bygging | 384.779 | 380.558 | -4.221 | -1,1 |
| Orkuveiting | 50.341 | 47.151 | -3.191 | -6,3 |
| Handil og umvæling | 594.801 | 582.305 | -12.497 | -2,1 |
| Gistihús og matstovur | 65.444 | 64.918 | -526 | -0,8 |
| Sjóflutningur | 260.851 | 284.867 | 24.015 | 9,2 |
| Flutningur annars | 142.981 | 156.137 | 13.156 | 9,2 |
| Postur og fjarskifti | 165.099 | 163.336 | -1.763 | -1,1 |
| Fígging og trygging | 234.226 | 239.978 | 5.751 | 2,5 |
| Vinnuligar tænastur | 192.684 | 206.838 | 14.154 | 7,3 |
| Húshaldstænastur | 40.184 | 42.424 | 2.240 | 5,6 |
| Almenn fyrisiting og tænastur | 2.031.054 | 2.118.909 | 87.855 | 4,3 |
| Felagsskapir og mentan | 118.434 | 128.032 | 9.598 | 8,1 |
| Ótilskilað vinna | 42.549 | 57.120 | 14.571 | 34,2 |
| **Tilsamans** | **5.962.272** | **6.134.280** | **172.008** | **2,9** |
| **Høvuðsbólkar:** | | | | |
| Tilfeingisvinna | 897.361 | 926.756 | 29.395 | 3,3 |
| Vøruframleiðsluvinna | 1.176.603 | 1.162.662 | -13.942 | -1,2 |
| Privat tænastuvinna | 1.857.252 | 1.925.953 | 68.701 | 3,7 |
| Almenn tænasta og fyrisiting | 2.031.054 | 2.118.909 | 87.855 | 4,3 |
| **Tilsamans** | **5.962.270** | **6.134.280** | **172.009** | **2,9** |

*Lønargjaldingum í 1.000 kr. fyri árini 2004 og 2005, býtt á vinnugreinar og høvuðsbólkar.*

*Mynd: www.hagstova.fo*

i
Sosialurin